TING-HELLAN

# Mál og Mið

**Í vikuni vóru tvær stevnur hildnar, har landsins mál og mið vórðu viðgjørd. Onnur var um samspælið millum politikk og fyrisiting, hin um grundlógararbeiðið**

TINGHELLUANALYSAN
*Kári á Rógvi*



Marjun Hanusardóttir løgmansstjóri greiddi frá í fyrilestri á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum mánadagin, hvussu týðandi tað er at vit semjast um grundleggjandi felags virði. Hjá fyrisitingini, ið skal tæna politikarum úr øllum flokkum og vera til tænastu hjá fólkinum, er tað týðandi at seta orð tey virði, tær grundreglur og mannagongdir. Hesar skulu binda saman fyrisitingina og tryggja áhaldandi góða fyrisiting.

Hvørji virði tjóðin øll hevur, og hvussu landið Føroyar skipar seg var til viðgerðar á fundi, sum Havnar Framburðsfelag skipaði fyri týskvøldi. Har var orðaskifti um fyrra flaggdagsáltið hjá grundlógarnevndini. Nevndin hevur lagt upp til at samtykkja stjórnarskipan fyri Føroyar, sum skal koma í staðin fyri stýrisskipanarlógina. Uppskotið um stjórnarskipa ger nógv burturúr at orða mannarættindi, valdsavmarkingar, grundreglur og onnur politisk og samfelagslig virði, uppskotið fer tí nóg longri og víðari enn stýrisskipanarlógin.

Súsanna Danielsen løgtingsstjóri tók til á fundinum, at løgið var at fyrra flaggdagsálitið og uppskotið til stjórnarskipan ikki vóru meira umrødd, tí tey var nógv meira provokerandi enn uppskotið til ríkisflagg, sum hevur fingið nógva umrøðu.

## Lille kat på vejen

Men fyrst nøkur orð um forvitnisligan gest á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum. Poul Schlüter fyrrverandi forsætisráðharri helt røðu um fyrisitarar og politikarar. Tá eg hoyrdi Schlüter hugsaði eg um tað skeltið, sum ofta er at síggja á arbeiðsplássum víða íkring. Har plagdi millum annað at standa, at praksis er tá alt riggar, men ongin veit hví.

Danska skipanin er týðiliga av hesum slagi. Schlüter hevði alt gott at bera embætisfólki sínum og donsku skipanini, men dugdi ikki at siga, hví skipanin er so góð. Samstundis ávarðaði hann ímóti svensku fyrisitingarskipanini, men dugdi heldur ikki at seta orð á hví. Eisini helt hann bretsku sjónvarpsrøðina Yes Minister vera sera góða óhugnaliga nær veruleikanum, uttan nevna eitt einasta dømi um akkurát hvussu sendirøðin kann vera okkum til læru og áminning.

Hesin maður, sum í síni tíð lat okkum undirgrundina, uttan at vilja siga hví, lýsti ymiskt í donsku skipanini og helt ferð eftir ferð, at talan var um "rigtigt princip" ella um "god ordning" – men uttan nakrantíð sannførandi at siga, hvussu hesar skipanir virkaðu og serstakliga, hvussu tær kundu verið fluttar í onnur lond.

Røðan var borðin væl fram og stundum skemtilig, men minti meg á ráðstevnu, eg á sinni var á hjá grønlensku sjálvstýrisnevndini. Har vóru mangir serfrøðingar, ið høvdu skrivað drúgvar greinar og hildu forvitnisligar røður. Har var eisini fyrrverandi ráðharrin Isi Foighel, ið sat saman við Schlüteri í stjórn. Hann lat onga skrivaða grein frá sær, greiddi meira frá hvat hendi nær í tilgongdini við grønlendsku heimastýrisskipanini. Hinir frøðingarnir vildu hava hann at seta orð á, hví og hvussu tað bar til at geva Grønlandi sumt vald og summar heimildir og ikki aðrar. Hvør var nú støða Grønlands?

Isi tók tá til orðanna og lýsti støðu Grønlands við yrking hjá Piet Hein:

Lille kat, lille kat,
lille kat på vejen,
hvis er du, hvis er du?
Jeg er da min egen!

Sera hugvekjandi og fitt, men lýsti í grundini støðuna hjá mongum dønum, serliga juristum, skipanin riggar, men teir duga ikki siga hví – tí er best at hylja støðuna í retoriskum royki.

Hetta skal ikki misfatast sum at eg ikki haldi at danska skipanin riggar. Tað ger hon. Men danska politiska og fyrisitingarliga skipani er fyrst og fremst komin fram í siðvenju. Mangar ólukkur hjá okkum standast av, at vit taka til okkara orðingar úr donsku skipanini og seta tær í gildi uttan at gáða eftir donsku siðvenjuni.

Ikki minst í hesum í hesum døgum, tá kjakast verður um grundlóg ríkisins og uttanlandsheimildir er tað hugstoytt, at vit ikki gløggari fata donsku skipanina og hepnari nýta okkara egnu at náa innanhýis semju.

*Framhald á næstu síðu*




*Hvørji virði tjóðin øll hevur, og hvussu landið Føroyar skipar seg var til viðgerðar á fundi, sum Havnar Framburðsfelag skipaði fyri týskvøldi*

*Mynd: Hans Kárason Mikkelsen*